Chase farin í studio

Sunnudagin fer rockbólkurin Chase undir upptøkurnar til eina nýggja fløgu, sum skal koma út í ár

Sunnudagin verða fyrstu upptøkurnar til eina nýggja fløgu við rockbólkinum Chase gjørdar. Tað er trummuspælarin James Olsens, um fer í studio, og hann skal eftir ætlan brúka fýra dagar um at taka trummurnar upp.

Tað verður Niclas Johannesen, sum saman við James skal standa fyri hesum upptøkum, og Niclas fer eisini at standa fyri upptøkunum, sum byrja í Føroyum um eina góða viku.

Tónleikararnir í Chase eru sera fegnir um, at upptøkurnar nú fara í gongd.

– Sangirnir hava verið klárir leingi, men tað hevur gingið sera striltið at fáa lagt upptøkuarbeiðið til rættis, sigur Edmund Jacobsen, sum er sangari í Chase.

Teir, ið verða við á nýggju fløguni hjá Chase, sum verður tann næsta hjá bólkinum, eru Edmund Jacobsen (sang), Niclas Johannesen (gittar), Mikkjal Joensen (bass), James Olsen (trummur) og Stamen Stanchev (ljómborð). Harafturat er ætlanin at hava onkrar gestatónleikarar við á fløguni.

Kemur einki óvæntað upp í, so verður nýggja fløgan við Chase givin út áðrenn jól.

Edmund Jacobsen, sangari í Chase, sstudio at syngja sangir inn til eina nýggja fløgu hjá rockbólkinum

Umstøðurnar fyri dement í Føroyum vánaligar

-Í Føroyum eru í dag umleið 1000 dement. Hóast hetta stóra talið er vaksandi, eru nærum ongi tilboð til avvarðandi ella sjúk.

ALZHEIMERFELAGIÐ
Ingrid Bjarnastein

Næstseinasta sunnudag varð fyrsta felagið fyri dement sett á stovn í Føroyum, og varð hetta gjørt av tí, at tørvurin á slíkum felagið er ógvuliga stórur.

- Tá ein í familjuni verður raktur, stendur tú á berum. Tú veit ikki, hvønn tú skal venda teg til, ella hvagar tú skalt fara. Tí varð felagið sett á stovn, sum ein vegleiðari fyri avvarðandi og sjúk, sigur Sigrún Mohr, sum er formaður í nýggja felagnum.

- Vit hava fingið ógvuliga positivar reaktiónir felagnum viðvíkjandi, fortelur Sigrún Mohr. —Tað er næstan ikki fyrr enn nú, tað er uppdagað, hvussu vánalig støðan er.

Ongi hagtøl

Ongi hagtøl fyri dement í Føroyum finnast, men útfrá hagtølunum í øðrum londum, kann ein roknað út, at talið man liggja um 1000 sjúk.

Á stovnandi aðalfundinum hjá Alzheimerfelagnum var ein danskur professari frá universitetinum í Odense, sum hevur granskað nógv innan fyri demens. Ein kanning, ið hann hevur gjørt á Fyn kann vísa okkum á talið á dementum í Føroyum. Á Fyn búgva 10 ferðir so nógv fólk sum í Føroyum. Um vit so taka hetta talið og býta tað við 10 vísir tað okkum á, hvussu nógv dement eru í Føroyum.

Talið á dementum er alsamt vaksandi av tí, at miðaladurin veksur. Eldri tú verður, størri møguleiki er fyri at gerast sjúkur. Í Føroyum veksur talið við umleið 90 nýggjum sjúklingum um árið.

Vánaligar umstøður

- Ongi tilboð eru til sjúk ella avvarðandi, sigur Sigrún Mohr. —Láargarður hevur átta pláss til dement, og afturat tí eru nøkur fá í Vágunum. Síðani hevur tú eitt annað tilboð uppá umlætting tvær ferðir um árið í tríggjar vikur.

Ein sjúkur hevur brúk fyri tryggum umhvørvið, har helst ikki ov nógv fólk eru rundan um. Rúmini skulu ikki vera ov stór, av tí tey eru rættiliga í ørviti og missa ættarsansin.

- Felagið fer fyrst og fremst at miða ímóti at fáa búpláss til vega, tí tað er har tørvurin er størstur. Fólk ringja ofta og fortelja, hvussu støðan er, og tørvurin á dagtilhaldum og búplássum er alsamt vaksandi, greiðir Sigrún Mohr frá. —Fólkini í nevndini hjá Alzheimerfelagnum eru sinnað at arbeiða fyri sakini, og vilja veruliga gera okkurt við støðuna.

Kemur sníkjandi

Ikki er lætt at staðfesta, um ein familjulimur er vorðin sjúkur. Tey duga ógvuliga væl at goyma tað, og ofta megna tey at halda hetta loyniligt í fleiri ár.

Sjúkueyðkennini eru fleiri. Gloymska er tað fyrsta ein leggur merkis til. Sjúklingurin verður innanhokin, og snúgvar sær ofta undan ábyrgd. Tey sjúku vita sjálvi, at tey eru vorðin sjúk, men fjala tað ofta væl.

- Alzheimers er arvaligt, men kann eisini koma av øðrum sjúkum, sum til dømis heilabløðing, sigur Sigrún Mohr. —Tí er tað ógvuliga umráðandi, at ein fer til kanningar so skjótt sum sjúkueyðkenni vísa seg, tí tað kann væl verða aðrar sjúkur.

- Nú hava vit heiligvágur fyri dement. Hann lekir ikki, men hann gevur tær betri liviumstøður í upp til fleiri ár. Skjótari tú kemur í viðgerð, jú betri er tað, greiðir Sigrún Mohr víðari frá.

Eldri í vanda

Eldri tú ert, størri er vandin fyri at gerast dementur. Sagt verður, at sjúkan oftast rakar fólk í aldrinum frá 65 árum og uppeftir, men tað eru eisini fólk í 50´unum og heilt niður í 40 árs aldurin, ið hava verið rakt, men er hetta ikki vanligt.

- Politikkarnir hava nú so við og við fingið eyguni upp hesum viðvíkjandi, sigur Sigrún Mohr. —Til dømis hevur Javnaðarflokkurin tikið eldrapolitikk á skránna, og býráðið hevur sagt, at tað fer at byggja eini hús til tey dementu. Alzheimerfelagið fer so at arbeiða fyri at fáa hesi tiltøk sett í verk.

- Vit vita ikki rættiliga, hvussu og hvat ætlanin er at gera av tí felagið er so nýtt. Vit hava bert havt ein fund enn, og verður ein fundur í vikuni.

Spurd um, hvussu tað ber til, at onki felag fyri dement er stovnað fyrr, tá tørvurin vísir seg at vera so stórur, svarar Sigrúm Mohr: -Tað eru jú nógv felø fyri alt møguligt, men ongin fyri júst hendan bólkin. Tá eg havi tosað við sjúkrasystrar, hava tær sagt, at tað noyðist næstan at vera ein avvarðandi, ið fer undir eitt tílíkt tiltak av tí, at tey kenna best til hetta. Trupulleikin er bara tann, at sum avvarðandi fyri ein dementan, hevur tú ikki yvirskot til tess, tí at eitt tílíkt arbeiði fer jú við nógvari tíð og orku.

Felagið hevur longu fingið nógvar limir, og er hetta ógvuliga positivt. Ein og hvør, ið hevur hug, kann tekna seg sum lim hjá felagnum. Tilmeldingarskjøl liggja á posthúsum og apotekunum kring landið.

Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verfaðir og abbi

Joen Hendrik Zachariassen

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Sørvágs kirkju, tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

Ruborg, Jens Erik, Maria Eyð og Henry